**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Úttøkuskipan til NMU 2023

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til Norðurlendsku Meistarstevnuna fyri Ung sum verður í Jönköping í Svøríki hin 8. og 9. juli 2023.

Kravtíðirnar eru funnar við at rokna meðaltíð fyri veikastu heiðursmerkjatíð í viðkomandi grein á seinastu trimum EvropaMeistarastevnum á langgeil, og so leggja ein prosent-sats afturat. Veikasta heiðursmerki er vanliga bronsa, men kann vera silvur ella gull.

Prosent-satsurin til NMU eru í ár settur at vera +17% av hesum meðaltíðum frá EM.

Um tað vísir seg at vera færri enn 8 sum klára hesar kravtíðir, so kann hugsast at SSF tekur eyka svimjarar út, við støði í hvussu nógv FINA stig tey hava klárað í síni bestu grein, tó við einum minstamarki á 500 FINA stig

Norðurlendska svimjisambandið loyvir í mesta lagi 4 svimjarum av sama kyni úr sama landi at luttaka í somu grein, sum kann verða avmarkandi ifall at fleiri enn 4 klára kravtíð í somu grein.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar til liðsvimjing.

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2023.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 4. juni 2022 (FML 2022), til og við 20. mai 2023 (SuSvim Open).

Árgangirnir eru sum tilskilaðir í yvirlitunum; gentur føddar 2008-2010 og dreingir føddir 2007-2009.

Sí annars "Reglugerð um úttøku og kravtíðir":
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS

# Kravtíðir til NMU 2023

At klára á langgeilastevnum við góðkenning frá SSF innan kravtíðarskeiðið

| Gentur f. 2008-2010 | Grein | Dreingir f. 2007-2009 |
|---|---|---|
| 00:28.48 | **50 frí** | 00:25.41 |
| 01:02.56 | **100 frí** | 00:56.01 |
| 02:16.61 | **200 frí** | 02:03.78 |
| 04:48.56 | **400 frí** | 04:24.07 |
| 09:51.08 | **800 frí** | - |
| - | **1500 frí** | 17:20.55 |
| 01:09.56 | **100 rygg** | 01:02.25 |
| 02:30.16 | **200 rygg** | 02:16.02 |
| 01:17.71 | **100 bringu** | 01:09.08 |
| 02:47.60 | **200 bringu** | 02:30.61 |
| 01:07.28 | **100 fírvald** | 00:59.92 |
| 02:29.66 | **200 fírvald** | 02:14.71 |
| 02:33.01 | **200 blandað** | 02:17.88 |
| 05:24.56 | **400 blandað** | 04:56.05 |

ATLANTIC AIRWAYS